sum er sunnast og vestast í Onglandi við Ermasund. Har høvdu bretar lagt minur, sum skuldu forða fyri týskari innrás í Bretlandi, hóast tað einki var vitað um nakra ítøkuliga ætlan. Men neyðugt var at gera eitt nágreiniligt yvirlit yvir, hvar hesar minur lógu, so tað tær ikki gjørdust vandafuldar fyri bretsk og sameind skip.

Har vóru vit ikki álopnir av týskarum, men seinni tá eg var í Plymouth, vóru vit álopnir.

Frá Cornwall varð eg sendur til Plymouth, til eina serliga deild at gera tunellir, har eg var hildin at vera serfrøðingur. Plymoth var ein stór flotastøð. Eg skuldi vera við til at gera eina herstøð fyri Mountbatton, sum var admiralur, og sum seinni gjørdist seinasti bretski varakongurin í India. Hann var systkinabarn pápa Elisabeth drotning, King George. Mounbatton varð í august 1979 dripin av IRA, tá báturin hann var umborð varð sprongdur í luftina.

Tað var í Plymouth, at D-dagurin, innrásin í Europa, skuldi fyrireikast.

Her var eg so eina tíð, og fekk so boð um at fara norður eftir til eina uppgávu. Eg skuldi fara av landinum aftur, men hetta varð so avlýst. Síðan vóru einir 40 okkara tiknir út at verða sendir til okkurt stað, sum vit ikki visti hvar tað var. Vit roknaðu við at verða sendir onkunstaðni við Miðalhavið. Tá vóru vit sendir til Yorkshire norðuri í Onglandi. Í september 1943 varð eg boðsendur at fara til Halifax í Yorkshire, og vit vandu har átta vikur, og var hetta ein hørð og áhaldandi venjing. Her runnu vit niðan og oman fjøllini.

Tá fingu vit boð um at fara til goymsluna á herstøðimi at fáa tropuklæðir. Hetta tóku vit sum eina ábending um, at vit skuldu fara í heitari lond.

## Leiðin gongur til Føroyar

Men so fingu vit boð um at lata klæðini inn aftur, so onkur ætlan hevur verið broytt. Hesa tíðina vóru nakrir serfrøðingar sendir til Ruslands, sum nú var ein av teimum sameindu. Men vit vistu ikki, hvagar vit skuldu fara. Vit vóru einir 14 í bólkinum. Síðan vórðu vit sendir til Glasgow, har vit skuldu fáa nærri boð. Júst tá varð vístur ein filmur fyri okkum um onkran oyggjabólk í Kyrrahavinum, tað var vist Hawaii, og vit spekuleraðu uppá, um vit mundu fara at verða sendir hagar!

Men úr Glasgow vórðu vit sendir til Inverness í Skotlandi og haðani til Invergordon, har tað var ein stór flotastøð. Her sóu vit eina rúgva av fólki, sum vóru komin heim í farloyvi úr Føroyum. Hetta sóðu vit á einum tekni, teir høvdu á uniforminum, sum var ymiskt fyri hvørja herdeild. Teknið hjá teimum, sum komu úr Føroyum var eitt tjaldur, og tá varnaðust vit, at tað var til Føroyar, vit skuldi fara.



*Her hugna teir sær í barakkum. Báðar myndirnar úr barakkunum tók Harry um 1943/43 úti á Bakka í Sørvági*

Vit fara umborð á skipið Ben My Cree, og eg haldi at hetta var eitt skip, sum vanliga sigldi við ferðafólki til Isle of Man, og sum nú var nýtt til troppaflutning. Eg hevði verið umborð á hesum skipi í friðartíð til Isle of Man. Vit komu upp til Føroyar ein sera myrkan dag. Eg haldi, at tað var seint í september ella fyrst í oktober. Tað var jú myrkalagt, tá vit komu inn móti Havnini, so tað var lítið vit sóu. Men síðan sigldu vit til Sørvágs. Nakrir av hermonnunum skuldu heim til Bretlands, og vit komu fyri teir. Tá vóru framvegis ein hópur av bretskum hermonnum í Vágum, sum jú var høvuðsstøðin fyri bretarnar í Føroyum. Her vóru jú upp til 5000 bretskir hermenn í senn, og tað vóru upp til 9.000 hermenn í øllum Føroyum. Vágafólk vóru ein lítil minniluti í oynni, og tey máttu enntá hava pass, um tey skuldu í oynna. Her vóru bretskir stovnar av ymiskum slagi sum sjónleikarhús, kirkja og eisini sjúkrahús.



*Ein kaffimunnur er góður í krígg*i

Men júst um hesa tíðina byrjaðu bretar at senda hermenninar heim aftur í rættiliga stórum tali. Vandin av týskarum var tá ikki so stórur longur. Teir høvdu nóg mikið um at vera í Russlandi, samstundis sum bretar høvdu meira brúk fyri sínum hermonnum á øðrum hermótum, eisini í samband við ætlaða D-dagin.

## Antiklimaks at koma til Føroyar

At koma til Føroyar var eitt slag av antiklimaks. Eg var væl útbúgvin hernaðarliga, og hevði eisini eina góða venjing frá fyrra partinum av krígnum, har eg jú hevði verið úti fyri einum sindri av hvørjum. Men so at koma til Føroyar, har tað veruliga ikki var nakar bardagi. Hetta var sanniliga ein stórur munur.

Her var eisini ein deild av Cameronians, sum eisini veruliga hevði roynt at verið í bardaga aðra staðni, teir høvdu tá mist 120 av 850 monnum. Teir vóru sera væl vandir. Leiðarin hjá teimum hevði fingið eina ta hægstu medaljuna í bretska herinum. Teir munnu hava havt somu kenslu, sum eg sjálvur.

Sjálvur var eg við í einum verkfrøðingaliði, sum hevði byggiuppgávur um hendi.

Eg var so í Vágum í 20 mánaðar. Tað vóru aðrir, sum høvdu verið í hálvt fjórða ár. Fólk vóru sera vinarlig, og eitt tað fyrsta eg minnist er, at tveir hermenn vórðu giftir við tveimum systrum. Tað vóru annars nógv giftarmál millum bretskar hermenn og gentur úr Vágum.

## Kom at kenna nógv fólk

Eg kom eisini at kenna nógv fólk í Sørvági. Ein tann fyrsti føroyingur, sum eg kom at kenna kallaðist Sanna Petersen. Hon átti ein beiggja sum æt Hanni, og sum var bátasmiður. Hon hevði eisini ein beiggja sum kallaðist Napoleon Petersen, sum var skúlalærari í Sørvági, seinni gjørdist hann lærari á Slættanesi. Hann var pápi Kára, sum giftist við Maritu Petersen, løgmann fyrst í 90-unum, sum tað júst er skrivað ein bók. Eisini var ein beiggi sum kallaðist Poul. Hann varð ítróttarlærari í Havn. Hann gjørdist formaður í ÍSF og ítróttarráðgevi hjá skúlunum. Hann plagdi í 50-unum at ferðast til teir ymisku skúlarnar á landinum at leggja teimum lag á við ítrótti. Ein annar beiggi var Daniel.

Eg kom eisini at kenna Joensen familjuna í Sørvági. Eg og Leon Joensen, sum gjørdst tingmaður fyri Sambandsflokkin 1954-1974, blivu góðir vinir. Eg kendi eisini foreldrini hjá honum. Kendi eisini væl Giggu Mouritsen, sum búði í Havn, og sum var gift við Karl í Kaffivogninum. Louis Joensen, sum búði seinni í Mykinesi, var beiggi Giggu. Hann doyðu longu, tá ið hann var 50 ár. Poul Arni, Karla, Kristoffur og Louis, systkin hjá Giggu, vóru systkinabarn Leon. Páparnir vóru brøður. Tey gomlu vóru sera fitt. Tey plagdu at siga við meg, tá eg fór til Havnar, at eg mátti fara at vitja Giggu, og har vitjaði eg ofta. Eg kendi eisini fleiri á mínum aldri, sum til dømis Frits og Lars Larsen,



*Millum teir sum Harry kom at kenna væl var Leon Joensen, sum var løgtingsmaður fyri sambandsflokkin fyri Vágar í nógv ár*